# Yvirlýsing

Fleiri arbeiðsgevarar halda ikki sáttmálaásetingarnar um flytan av prosentgjøldum til eftirløn og lívstrygging hjá arbeiðsfólki

Alsamt fleiri arbeiðsfólk hava gjørt vart við, at arbeiðsgevarar flyta ikki prosentgjøldini sambært sáttmálanum.

Hesir somu arbeiðsgevarar eru eisini givnir við at trekkja prosentgjøldini til lívstrygging og limagjøldini.

**Avleiðingin av hesum er:**

- at arbeiðsfólkini hjá hesum arbeiðsgevarum ikki spara upp til ellisár síni, og
- at hesi arbeiðsfólk ikki eru dekkaði av samhaldsføstu lívstryggingarskipan okkara.

**Lívstryggingarskipanin**

Samhaldsfasta lívstrygging okkara fevnir um:

- útgjald um arbeiðsfólkið fær eina av teimum hættisligu sjúkum, sum nevnd er í tryggingartreytunum.
- útgjald um barn hjá arbeiðsfólkinum fær eina av teimum hættisligu sjúkum, sum nevnd er í tryggingartreytunum,
- útgjald til tey sum eftir sita, um arbeiðsfólkið doyr,
- útgjald við 67 ára aldur til tey arbeiðsfólk, sum í 10 ára hava verið við í skipanini.

**Áheitan til limir okkara.**

Føroya Arbeiðarafelag fer at almannakunngera nøvnini á teimum arbeiðsgevarum, sum ikki halda galdandi sáttmála.

Vit skulu tí heita á allar limir okkara um at kanna um alt er í lagi við lønarseðlunum.

Um lønarseðilin ikki er í lagi, so verða limirnir bidnir um at venda sær til felag okkara.

*Tórshavn, tann 17.04.2008*
*Føroya Arbeiðarafelag*
*Ingeborg Vinther*

**Føroya Arbeiðarafelag**

## Savnsfólk

Listasavn Føroya søkir eftir einum savnsfólki at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Hava ábyrgd av avgreiðsluni og sølubúðini
- Skráseta listaverk
- Hjálpa til í sambandi við ymiskt virksemi á savninum
- Vanligt skrivstovuarbeiði og annað
- Arbeiðstíðin er einar 30 tímar um vikuna, men kann gerast longri viðhvørt

**Vit vænta, at tú:**
- hevur áhuga fyri list
- dugir væl føroyskt, skandinaviskt og enskt
- hevur telduførleika á brúkarastigi
- ert røkin, opin og fyrikomandi
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt, men eisini at samstarva og samskifta
- ikki ræðist avbjóðingar og kanst arbeiða við fleiri uppgávum samstundis
- kanst viðhvørt arbeiða í ólagaligum arbeiðstíðum

**Vit bjóða:**
- eitt persónliga mennandi arbeiði
- eitt mentanarligt arbeiðspláss við skiftandi arbeiðsuppgávum og skiftandi arbeiðstíðum
- góðar arbeiðsumstøður

**Løn:**
- Løn sambært avtalu

**Umsókn:**
- Fleiri upplýsingar fáast við at ringja ella at senda teldubræv til okkara
- Umsóknin kann sendast sum vanligt bræv ella teldubræv til:

**Listasavn Føroya**
Postboks 1141, Gundadalsvegur 9, FO-110 Tórshavn
info@art.fo, tlf. 31 35 79

# Summarhús
## til sølu í Kvívík



Um hóskandi boð fæst, eru matr. nr. 81 Uppi í Trøð 1, ið er partur av langari lon við tilhoyrandi hjalli, til sølu.

Húsini, sum eru 34 m², hava nýggj vindeygu, bjálvaði og eru klødd við timbri.

Húsini eru í 3 hæddum, allar hæddir eru innrættaðar.

Hava tit fyrispurningar eru tit vælkomin at ringja á tlf. 212907 ella 421265.



# Handilshøli til sølu

Handilshøli á Jónas Broncks gøtu 40 er til sølu.

Liggur ógvuliga væl fyri. Stór vindeygu og beinleiðis inngongd frá Jónas Broncks gøtu. Sera góð parkeringsviðurskifti. Framsíðan er bjálva, nýliga klødd og vindeygu og hurðar eru nýggj. Suðurvendur havi við inngongd til íbúð.

**Gøtuhædd:** Handilshøli, skrivstova, goymslurúm við brúsu og vesi. Tilsamans 90 m².

**Íbúð 1. hædd:** Køkur, 2 stovur, 2 kømur, gongd, baðirúm, trappurúm til loft. Tilsamans 90 m².

**Loftið:** 1 kamar, loftið kann tildømis gerast um til eina íbúð fyri seg.

Prísur: 2,3 mió.

**Áhugaði kunnu ringja á tlf. 210405**

## Felagsmissiónsvika í Nesvík 2.- 4 mai:

**Fríggjadagin 2. mai**
**kl. 19:30** Møti v. Hanus Simonsen, presti og Streingjakórið í Vágum syngur

**Leygardagin 3. mai**
**Kl. 19:30** "Syngið við"-møti v. Miktam og Vestkolli. Innsavnan til landsarbeiðið hjá Heimamissiónini

**Sunnudagin 4. mai**
**Kl. 15:00** Familjumøti v. Maju Jacobsen o.ø. Innsavnan til barnaarbeiðið.
**Kl. 18:00** Møti v. Torleif Johannesen, sjómanstrúb. Petur Hans og Thomas Dam syngja. Innsavnan til landsarbeiðið hjá Heimamissiónini

# *Til Sølu*
## Um hóskandi boð fæst




- Komatsu PC130 árg 2003
- Koyrt 3800 tímar
- Hydrauliskt skifti v/3 skuffum
- Hydraulik til brekkara

**Áhugað ringið tlf 213577**